TJÓÐSAVNIÐ

# Lundi

## *Fratercula arctica grabae*

## Teljing í Mykinesi í 2023

Leivur Janus Hansen, Jón Aldará.

**24-01-2024**



Í August vóru lundaholur í Mykinesi kannaðar. Endamálið var at meta um, hvussu nógvir ungar kundu koma undan í 2023. Í 2011, 2012 og 2013 var eingin livandi pisa at síggja í nakrari kannaðari holu. Í 2014 til 2022 sóust pisur í holunum og í 2023 vóru pisur í 43% av holunum.

# Endamál
Endamálið við teljingini er at gera eina meting av talinum av búfuglum í lundastovninum í Mykinesi. Somuleiðis skal ein meting gerast um gongdina hjá hesum lundastovninum.

# Arbeiðsháttur
Mannagongdin, ið nýtt varð, er útgreinað í Lundi *Fratercula arctica grabae*: mannagongd fyri teljing – dagførd 2022 (Hansen, 2023).

Hvørt einstakt 10m$^2$ (30m m$^2$ í 2011-12) økið í einum 20x20m punti verður í hesi frágreiðing nevnt ein puntur. Sí Talvu 1.

Holur vórðu kannaðar fyri at telja, hvussu nógvar pisur kundu væntast floygdar. Tað varð gjørt við at hyggja eftir um feskur skvettur var í holuni.

Mannagongdin við skvetti varð eftirkannað. Holur har tað fyri víst var ein pisa í vóru kannaðar fyri skvett.

Teljarar vóru Jón Aldará og Angela Djurhuus.

# Virksemi
Í 2023 varð kannað hvussu stórur partur av holunum vóru í brúk, produktiónina hjá lundunum í Lamba og Dalinum (Talva 2.) og holur har ein pisa var vóru kannaðar fyri skvett. Hetta síðsta fyri at kalibrera teljiháttin háttin.

Talva 1. Brúnir puntar vóru kannaðir við endoskopi. Gráir puntar vóru kannaðir fyri skvett. Støddin á reyða prikkinum endurspeglar hvussu nógvar holur høvdu ábending um pisu (2014-) ella høvdu egg (2011-13).



2011



2012



2013



2014



2015



2016



2017



2018



2019



2020



2021



2022



2023

Í August 2023, varð kannað í hvønn mun holur høvdu verið nýttar. Tá verður hugt eftir, um mold liggur útfyri holuna, um grasið er traðkað, um skvettur sæst og so framvegis. Mannagongdin er, at um skvettur sæst í holuni, varð mett at ungi var í holuni.

Í 2011 til 2022 vórðu puntar kannaðir í Lamba og Dalinum. Harumframt varð ein puntur kannaður í Hólmi í 2012. Samlað tal av holum, brúktum holum og tal av holum við ungum varð talt í hvørjum útvaldum punti.

Í 2011 og 2012 vórðu heilt fáir puntar kannaðir; fýra í 2011 og fimm í 2012. Tá varð kannaða flatan lutfalsliga stór, 30 $m^2$. Í 2013 til 2018 varð flatan í kannaðu puntunum minni, 10 $m^2$ og talið av teimum var hægri; 27 í 2013, 46 í 2014, 44 í 2015, 91 í 2016, 88 í 2017, 92 í 2018, 82 í 2019, 110 í 2020, 94 í 2021, 149 í 2022 og 139 í 2023. Fyri flestu árini var galdandi at í onkrum av puntunum var als eingin hola.



**MYND 1. SILDBERI.**

# Úrslit

Talva 2. Í 2011 til 2023 vórðu holur kannaðar. Tær vórðu skrásettar sum óbrúktar, brúktar og brúktar við livandi pisu. *Rætting: var skrivað skeivt (47) í frágreiðingini fyri 2022.

| | Lamba | | | Dalurin | | | Hólmur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt | Pisa |
| **2011** | 93 | 56 | 0 | 97 | 44 | 0 | | | |
| **2012** | 43 | 99 | 0 | 42 | 74 | 0 | 14 | 18 | 0 |
| **2013** | 41 | 91 | 0 | 47 | 82 | 0 | | | |
| **2014** | 60 | 105 | 4 | 40 | 108 | 4 | | | |
| **2015** | 34 | 104 | 9 | 39 | 102 | 5 | | | |
| **2016** | *109* | *196* | *<85* | *187* | *207* | *<44* | | | |
| **2017** | 35 | 164 | 87 | 81 | 153 | 69 | | | |
| **2018** | 61 | 187 | 72 | 116 | 145 | 41 | | | |
| **2019** | | *123* | *<50* | | *176* | *<170* | | | |
| **2020** | *48* | *159* | *22* | *94* | *186* | *36* | | | |
| **2021** | *33* | *185* | *34* | *153* | *241* | *52* | | | |
| **2022** | *36* | *330* | *126* | *97** | *388* | *138* | | | |
| **2023** | *67* | *403* | *202* | *122* | *314* | *161* | | | |

## Úrslit fyri 2023

Í 2023 var kannað hvussu nógvar holur, ið fyri víst høvdu unga, eisini sóust hava skvett í holumunnanum. Tað vísti seg at vera 93%. Hetta tal varð brúkt fyri at fáa eitt rættari tal av holum við pisu.

Í 139 puntum vóru 906 holur. Av hesum vístu 717 tekin um brúk. Av hesum 717 holum vóru 363 við skvetti í holuni. Tá hetta talið verður roknað saman við áðurnevndu 93%, so vóru tað 43% av holunum við pisu.

Tað eru um 60.000 holur vestanfyri bygdina (Hansen, Simonsen, & Danielsen, 2013) og tískil er endaliga úrslitið 25.611 livandi pisur.

# Niðurstøður

Hvørki í 2011, 2012 ella 2013 vórðu livandi pisur sæddar í holum, sum vórðu kannaðar. Tað merkir, at hóast onkur pisa varð floygd í økinum, so hevur talið í mesta lagið verið nakrar hundrað. Nøkur egg vóru tó at síggja, men hetta verður ikki roknað sum nóg góð ábending um pisa kom í reiðrið.

Í 2014 og 2015 vóru ávikavist 3% og 5% av holum við pisum. Tað merkir, at í økinum vestanfyri bygdina kann talið hava ligið um 1500 livandi pisur í 2014 og 3000, ella enntá so høgt sum 18.000, í 2015 (sí frágreiðing fyri 2015).

Í 2016, 2017 og 2018, 2019, 2020, 2022 vóru ávíkavíst 18% (tó, sí frágreiðing fyri 2016), 36% 22%, 36%, 13%, 15%, 36% av holum við pisum og í 2023 43%.




**MYND 2. BLÁA STRIKAN ER BRÚKTAR HOLUR OG REYÐA STRIKAN ER KALIBRERA TAL AV HOLUM VIÐ PISU, LJÓSAREYÐA ER IKKI KALIBRERA TAL.**

## Tøkk
Jarðeigarar og fólk annars í Mykinesi skulu hava tøkk fyri hjálp og vælvild.

## Keldur

Hansen, L. J., Simonsen, W., & Danielsen, J. (2013). *Lundi Fratercula arctica grabae: Teljing í Mykinesi í 2012*. Tórshavn.

Hansen, L. J. (2023). *Lundi Fratercula arctica grabae: Mannagongd fyri teljing - dagførd í 2022*. Tjóðsavnið, Tórshavn.